

*Her stuttleika tey sær á sandinum*



*Eldorado hjá børnunum í Puntabyrgi*



*Gerda undir Bakkanum í Puntabyrgi*

í húsinum. So høvdu vit eisini kúgv, hønur, dunnur og gæs, so her manglaði einki.

Fyri at fortjena eitt sindur ekstra plagdi omma at gera bróstsukur og slikkipinnar, sum vórðu seldir til fólk.

Fólk vóru ikki so forvand við góðgæti sum í dag. Bróstsukur var tað mest leskiligasta góðgæti, sum kundi hugsast.

Fólk fóru ikki útferð, uttan at tey steðgaðu omanfyri Puntabyrg at vita, um omma áttu bróstsukur. So keypti tey sær nakað at hava við.

Hetta var eini hús, har allur ungdómurin samlaðist. Men tá hetta vóru javnaldrar hjá systkjunum hjá mammu vóru tey eldri enn eg. Nógv av systkjunum vóru tó flutt út. Tað vóru Gunnar og Emil, sum vóru heima tá. Tað vóru nógv ungfólk á garðinum, grannalagnum, á teirra aldri. Her samlaðist alt um kvøldarnar.

Tey høvdu ein stóran køk í Puntabyrgi, og her ofta fult. Fekst ikki sitið á bonkunum, so sótu tey á gólvinum. Tað var eisini sungið nógv.

Tað er mær fortalt, at tá ið tey øll vóru ung, mammusystkini hjá mær, tá plagdu tey at hava dans fyri ungdómin í stovuni eisini. Abbi spældi harmoniku og omma munnharpu.

Hetta fylgdi við tíbetur. Tað var ofta nógv fólk eisini heima hjá okkum, tá børn míni Pauli og Edna vóru lítil. Her var lív og musikkur. Tað hevur verið deiligt.

Og nú er tað tað sama heima hjá Paula eisini.

## Hvørt oyra gjørdi mun

Sum sagt høvdu vit tann fyrimun, at vit áttu jørð í húsinum. Men tað vóru ikki øll sum áttu jørð, og sum kundu fáa so gott í beinið sum vit.

Tað var deiligt at vaksa upp á Tvøroyri. Pengar vóru fáir, tá ið man var lítil. Vit plagdi at fortjena nøkur oyru við at banka ís og at selja hann til Paula Nolsøe á Tanganum, sum keypti fisk. Vit fingu 25 oyru fyri hvørja spann. Vit føldu okkum at vera ordiliga rík tá. Hetta var áðrenn menn fóru at framleiða ís av álvara.

Hvørt oyra taldi tá. Eg minnist eina ferð, eg kom inn til Jens abba. Hann sat í tí gamla køkinum og segði: "Oy Jesus, abbi hevur mist eitt oyra, og eg finni tað ikki." Hann royndi at skava við stavinum eftir tí. Eg legði meg so á knæ at leita. Hetta var antin eitt eittoyra ella eitt tveyoyra. Eg fann tað. So gav hann mær eitt fimmoyra afturfyri. Tað var bara so heilt fantastiskt.

Annars hevði hann pakkað inn fimm einkrónur, eitt bunti til hvørt einasta abbabarn. Tað hevði hann í einum kistli. Eg minnist, tá ið hann var so sjúkur og lá til tað seinasta. Eg tordi ikki fara niðan, tí eg visti, at hann fór at doyggja. Eg var um 10 ára gomul tá. Men ein dagin segði pápi mín, at nú mást tú fara niðan til abban. Hann fær ikki doyð, og hann blívur við at spyrja eftir tær. Eg fari so niðan. Abbi gevur eitt tekn, og pápi tekur so skríníð og setur tað á bringuna á honum. Eg minnist, at hann tók sína visaligu hond niður í skríníð og gav mær hendan pakkan við 5 krónum í. Hetta skuldi vera framskundað konfirmatiónsgáva. Eg var ikki komin út úr kamarinum aftur, tá var abbin deyður. Hann bara bíðaði eftir, at eg skuldi koma.

Omma var Victoria f. Thorsteinsson. Hana hómi eg akkurát, hon var blind seinastu árini.

Pápi átti fýra systkin. Tvey teirra doyðu sum smá. Pápabeiggi var Viggo Mortensen, sum var bátabyggjari. Undir einum drúgvum verkfalli í 1926, tá vørutrot var, var skipað fyri serligari útbýting av vørum til tey verkfalsraktu. Viggo var ein teirra sum var við í hesum.

Pápasystir mín Mathilda var gift við Kristian Holm í Hvalbæ. Kend børn hjá honum vóru Niels Pauli Holm, eygnalækni, og Morit, kona Erlend Patursson.

Tað var eisini stuttligt hjá børnum. Tá ið vit spældu úti, sótu hesir gomlu menninir á eini trappu og fylgdu við, at einki hendi okkum. Har var so nógvur ungdómur og so nógv børn. Mostir mín Nicolina átti átta børn. Gunnar mammubeiggi átti sjey og allir grannarnir áttu nógv børn, sum samlaðust. Tá var ikki brúk fyri ungdómshúsi.

Onkuntíð vóru serlig tiltøk. Klubbin plagdi at skipa fyri jólatræi fyri øllum børnum, og á nýggjárinum kundu man síggja teir skjóta fýrverkari. Tað var ofta sera flott.

## Gudmund var stóri maðurin

Tá var Gudmund í velmaktini hjá Mortensen. Hann var abbi tann Gudmund Mortensen, vit kenna í dag. Gudmund var ein stórur maður á Tvøroyri tá. Hann var eitt sindur lamin. Annað beinið var stívt. Eg minnist hann sum ein fittan mann.

Eg minnist eisini Johan Mortensen, sum stóð fyri krambúðini hjá Mortensen, áðrenn hon fór fallitt. Eg var onkuntíð har og keypti fyri abba, sum arbeiddi á bedingini, sum teir hjá Mortensen áttu.